Bankamálið dag fyri dag

1. oktober 1992: Kreppa er í Sjóvinnubankanum, sum ger, at landsstýrið lænir fyrstu pengarnar til bankabjargingarnar. Samstundis metir eitt upprit frá embætismonnum í loyniliga Føroya-Bólkinum, at bankunum fer at tørva 1,5 mia krónur. Uppritið sigur eisini, at Den Danske Bank sum høvuðspartaeigari í Føroya Banka helst fer at halda, at tað ikki er rættvíst, at hann skal kappast við ein banka - stuðalur av ríkinum.

4. oktober 1992: Á einum fundi í Fíggjareftirlitinum sigur Eigil Mølgaard, stjóri, at Den Danske Bank fer at halda sínar skyldur.

November 1993: Føroya Banki eru undir solvenskravinum og fær undantaksloyvi frá bankalógini.

31. januar 1993: Poul Nyrup Rasmussen kemur upp í málið. Á einum fundi um støðuna situr hann m. a. við uppritinum frá Føroy-bólkinum, sum síðani skal vísa seg at passa.

8. februar 1993: Den Danske Bank skrivar til forsætismálaráðharran. Bankin vil sleppa sínum skyldum í Føroya Banka. Síðani hevur bankin lættar samráðingar við Føroya-bólkin, sum hevur somu áskoðan um støðuna.

22. februar: Í einum uppriti til Forsætismálaráðið ger Tjóðbankin vart við, at avsetingarnar í Føroya Banka eru ov smáar.

25. februar: Á einum fundi í Forsætismálaráðnum luttaka Den Danske Bank, Tjóðbankin, Fíggjareftirlitið og fleiri ráðharrar. Eingir føroyingar eru við.

9. mars 1993: Fyri fyrstu ferð er tað greitt fyri Maritu Petersen, løgmanni, at hon er í ferð við at taka yvir Føroya Banka.

11. mars 1993: Føroya-bólkurin mælir forsætisráðharranum at seta føroyingum stólin fyri hurðina. Teir fara helst at vísa respekt, um Den Danske Bank lær í borðið, verður sagt. Frá stjóranum, Peter Straarup er greitt, at bankin er til reiðar at gera tað.

12. mars 1993: Føroyar Banki mælir ótryggum kundum til at flyta pengarnar til Den Danske Bank.

15. mars 1993: Fíggjareftirlitið krevur dagligar uppgerðir um likviditetin í Føroya Banka.

17. mars 1993: Marita Petersen, løgmaður og Jógvan Sundstein, fíggjarmálaráðharri eru í Keypmannahavn fyri at tosa um yvirtøku av Føroya Banka. Den Danske Bank gevur føroyingum ta avgerandi lyftu, at nyggjur kapitalur ikki er neyðugur.

22. mars 1993: Føroyingarnir góðtaka ta ætlan, sum ger landsstýrið til ánara av Føroya Banka.

25. mars 1993: Peter Straarup, bankastjóri, sendir eitt rættingarskriv til referatið frá 17. mars-fundinum. Váttanin frá Den Danske Bank tellur burtur. Føroyingarnir siga, at teir fáa einki at vita.

26. mars 1993: Føroya Banki uppfyllir nú heldur ikki likviditetstreytirnar í bankalógini.

3. april 1993: Stjórnarfundur í Føroya Banka. Av referatinum gongur fram, at bankanum tørvar 500.000 krónur í at lúka krøvini í bankalógini um solvenskrøv.

26. mai 1993: Fíggjareftirlitið sigur Føroya-bólkinum, at »man efter aftale« ikki hevur kannað teir føroysku bankarnar.

28. mai 1993: Stórir trupulleikar í bankunum, sum nú landsstýrið eigur. Føroyaingar læna 560 milliónir krónur úr Danmark.

22. juni 1993: Í einum svari til Fólkatingið skrivar Mogens Lykketoft, fíggjarmálaráðharri: »Efter bankhandelen har der været behov for kapitaltilførsler«

12. oktober 1993: Føroyingar mugu aftur læna pengar til bankarnar. Hesaferð er upphæddin 1,3 milliardir krónur.

24. mai 1995: Undir einum fólkatingsorðaskifti sigur forsætisráðharrin, at hann ongantíð og sæð profetiska uppritið hjá Føroya-bólkinum frá oktober 1992. Hann sigur ikki, at somu upplýsingar hava verið á borðinum undir fundinum í samskipanarnevndini hjá stjórnini. Politiskur meiriluti er fyri eina serfrøðingakanning av bankamálinum.

15. januar 1998: Jørgen Grønborg, advokatur, fer at handa kanningarúrslitið til Løgmálaráðið.

Poul Nicolopulo, politiskur skrivari á ensku sendistovuni í Danmark:

Dámar okkum væl at hoyra Poul Nyrup

JAN MÜLLER

-Tað ljóðar sera áhugavert, at danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen vil hitta bretska forsætisráðharran, Tony Blair fyri harvið at hjálpa føroyingum at loysa marknaósemjuna millum føroyingar og bretar.

Hetta sigur politiski skrivarin á bretsku sendistovuni í Danmark, Poul Nicolopulo við Sosialin. Hann er limur í bretsku samráðingarnevndini og hevur fleiri ferðir verið í Føroyum.

Poul Nicolopulo sigur, at av tí at samráðingarnar eru í trúnaði kann hann einki siga um gongdina, men heldur úttalilsini hjá danska forsætisráðharranum í føroysku pressuni vera sera áhugaverd og hugvekjandi.

-Eg giti, at hesi úttalilsini kunnu hjálpa føroyingum og vónandi allari sakini, sigur Poul Nicolopulo.

Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharri:

Vil fegin tosa við Tony Blair um markið

-Mítt instinkt sigur mær, at tað er rætt at umhugsa eitt politiskt umfar í marknatrætuni millum Føroyar og Bretland sigur Poul Nyrup Rasmussen

JAN MÜLLER

Úttalilsini hjá danska forsætisráðharranum Poul Nyrup Rasmussen í føroyskari pressu hertyri um marknaósemjuni millum Føroyar og Bretland hava møguliga við sær, at málið ikki endar í Haag uttan víðari. Tey kunnu benda á, at vit fáa eina politiska „rundu" eftir at samráðingarleiðin ikki kann brúkast meira. Tá Nyrup Rasmussen fór úr Føroyum seinasta mikudag bóðu vit hann um at greiða nærri frá, hví hann nú sjálvur vil hjálpa føroyingum í marknamálinum. Hann segði:

-Tað hevur ongantíð verið skeivt, tá tú hevur verið ígjøgnum nakrar tekniskar samráðingar á embætismannastigi - á serfrøðingastøði - at tú kemur hartil, at tú sigur við teg sjálvan: spurningurin er um vit ikki nú politiskt eiga at vita um ein kann at finna politiska loysn - eina neyðsemju, sum vit kunnu semjast um. Eg havi ta kenslu, at hetta er nakað, sum vit eiga at umhugsa.

Poul Nyrup sigur seg hava sagt við føroyskar politikarar og við landsstýrið, at verður tað í Føroyum gjørt av, at ein vil royna politisku leiðina, so fer hann at geva tí allan sín stuðul - 100%. -Eg vil eisini lova at hjálpa til uttan mun til um hetta verður á uttanríkis- ella forsætisráðharrastøði. Tað vil so eisini byggja á fyrireikingar og uppá samband við bretsku stjórnina.

Poul Nyrup leggur dent á, at tað verða føroyingar, sum koma at taka hesa avgerð og sigur -Mítt instinkt sigur mær, at tað er rætt at umhugsa hetta.